## Skjótibreytin yvirtikin



Tað hevur verið meira reglan enn undantakið, at manglar hava verið í fyrireikingunum til ymsu kappingarnar her á Rhodos. Hjá leirdúgvuskjúttunum var tó heilt galið, og her hava liðini sjálvi tikið avleiðingarnar. Við komandi vertstjóðini – Álandi – á odda hava luttakandi londini yvirtikið stóran part av arbeiðinum við kappingini. Og sum skilst, so gongur hendan nú eisini munandi betri, enn hon gjørdi fyrstu dagarnar.

## Tevez til United

Enska Daily Mirror skrivar, at Manchester United nú fer at samráðast við 23 ára gamla Carlos Tevez. Argentinski framherjin hevur seinasta árið spælt við West Ham, har hann gjørdist partur av stórum trætumáli um mátan, sum felagið hevði keypt hann. Sagt verður, at prísurin fyri spælaran er 20 milliónir pund.

# Røkka sínum máli



**Teir tríggir golfspælararnir síggja út til at røkka málinum, um ikki at enda aftast**

GOLF
*Rólant Waag Dam*

Áðrenn farið var undir seinasta umfar í dag, lógu teir tríggir føroyingarnir soleiðis fyri, at teir neyvan fara longur fram á stigatalvuni, og neyvan longur aftur heldur.

Teir liggja sum nummar 16 av 18 londum. Aftast eru Orkney-oyggjarnar, sum góvu avboð til leikirnar í síðstu løtu orsaka av yvirgangsatsóknini á flogvøllin í Glasgow herfyri. Næst aftast er so Sarema við 1006 sløgum, meðan føroyingarnir tilsamans hava brúkt 924 sløg. Liðið frammanfyri tað føroyska er Falklandsoyggjarnar við 843 sløgum, sum altso ikki verður tikið á hesum sinni.

### Í toppform

Men hóast málið sær út til at verða rokkið, so eru teir ikki allir nøgdir. Serliga teir báðir Rói Christiansen og Jónfinn Thomassen eru misnøgdir við teirra gongd. Rói hevur higartil brúkt 98, 87 og 91 sløg, meðan Jónfinn hevur sligið 101, 109 og 104. Tað er ikki nóg gott hjá teimum, eru báðir tveir samdir um.

Hjá Ragnar Isaksen er lagið heldur betri.

– Beint nú eri eg í toppform, staðfesti hann skemtandi eftir væleydnaða túrin á golfbananum í gjár, har hann brúkti 103 sløg. Tað er rímiliga stórt framstig hjá honum, tá hann annars brúkti 117 og 114 sløg teir báðar undanfarnu dagarnar.

Ragnar kann tó geva liðfeløgum sínum rætt í, at tað hevði kunnað gingið nakað væl betri hjá teimum øllum, síðani allir tríggir hava spælt yvir sítt handicap.

### Vánaligur bani

Rói, Jónfinn og Ragnar eru eisini allir á einum máli um, at banin teir spæla á, ikki er av teimum bestu.

– Hatta er ringur bani. Hann er ógvuliga flottur at hyggja at, men undirlagið er øgiliga vánaligt, sigur Ragnar.

Annars siga golfspælararnir somu søgu, sum flest av hinum føroysku ítróttarfólkunum. Tað er heilt ófatiliga heitt hjá teimum at spæla, og tað hevur eisini kostað. Ragnar Isaksen small um fyrsta dagin á vøllinum orsakað av saltmangul, men kom seg skjótt og var á bananum aftur dagin eftir. Hjá øðrum golfspælarum hevur gingið verri, og summir hava sitið dagar uttanfyri, orsakað av sjúku av hitanum.

*Føroyingarnir eru samdir um, at tað ikki hevur gingið nóg væl at raka tey 18 holini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Bronsan helst rokin



*Tað verður um reppið, at Marius Joensen fer at røkka finaluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Møguleikin at endurvinna bronsuna í skeet frá seinastu oyggjaleikum er so at siga horvin**

SKJÓTING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað gekk illa í hond við skjótingini hjá Marius Joensen og Magna Dam í gjár. So mikið illa, at dreymurin um hjá Mariusi Joensen um at endurvinna bronsuna frá leikunum á Hetlandi, nú bara livir í teoriini.

- Eg veit ikki hví tað gekk so, men eg haldi at flestu skjúttarnir av eini ella aðrari orsøk høvdu ein lítlan offdag nú, staðfesti Marius eftir skjótingina í gjár.

Hann liggur í løtuni nummar tíggju við 56 dúgvum. Magni Dam liggur nummar tólv við 54 dúgvum.

Finalan rúmar bara seks skjúttum, men hóast tað sambært skjúttunum sær svart út hjá teimum, so er tað ikki verri enn so, at Marius bara er tríggjar dúgvur vekk frá einum finaluplássi. Um hann røkkur hesum fæst svar fyri eftir kappingina í morgin.

Marius sigur annars, at skjúttarnir hava tikið seg nógv fram síðani seinastu oyggjaleikir, umframt at onkrir nýggir heilt góðir skjúttar eru komnir aftrat.

### Fara til Álands

Nú dreymurin um at endurvinna bronsuna er so at siga rokin, eru tankarnir so smátt farnir at leita víðari fram í tíðina. Um tvey ár eru næstu oyggjaleikir á skránni, Hesir vera á Álandi, og Áland hevur longu nú boðið føroysku skjúttunum til eina kapping har komandi ár.

- Tað verður til midsommer har, og tað er so púra vist at eg ætli mær. Teir siga seg hava heimsins besta skeetbana, og hann kundi eg hugsað mær at roynt. Eisini so at man er fyrireikaður til oyggjaleikirnar í 2009, sigur Marius.